Føroyingar og bretar aftur til samráðingarborið:

Avtala millum Grønland og Ísland týdning fyri Føroyar-UK

Tað var undir eini arbeiðarastjórn, at bretar settu ynski fram um, at miðlinjan skuldi vera fiskimark. Nú Grønland og Ísland hava avtalað, at miðlinjan har skal vera bæði fiskimark og undirgrundarmark, kann slíkt modell gerast aktuelt í samráðingunum millum Føroyar og Bretland.

JAN MULLER

Nú um dagarnar frættist, at samráðingarnar um markið millum Føroyar og Bretland, verða uppafturtiknar í Keypmannahavn tann 16. juli. Tað er meira enn eitt ár síðani, at fundur var millum partarnar. Hesa tíðina hava bretar havt til at umhugsa eitt nýtt útspæl og var ætlanin at halda fund 2. apríl, men so kom bretska valið, og samráðingarnar vórðu útsettar í óásetta tíð.

Bretar umrøddu miðlinju alment

Hetta árið meðan bíðað hevur verið eftir bretskum útspæli, hava verið ymsar viðmerkingar frá bæði almennari síðu og frá oljufeløgum.

M.a. kom fram í røðu, sum táverandi orkumálaráðharrin Frazer helt fyri oljuvinnufólki, orðið miðlinja. Ráðharrin brúkti fyri fyrstu ferð vendingina miðlinja í sambandi við samráðingarnar við føroyingar. Hann segði m.a., at tað hevði skund at fáa eina miðlinju uppá pláss. Frammanundan hava bretar als ikki viljað tosað um miðlinju, tí krøv teirra hava gingið nógv longur enn til eina miðlinju.

Um hetta vóru nýggir tónar frá bretskari síðu ella tað bara var talan um eitt málbrúk, sum ikki varð nýtt áður, vita vit av góðum grundum ikki, tí einki útspæl hevur verið frá bretum síðani. Men tað kann vera, at tað, sum her er komið fram, verður nakað av tí, sum verður við í útspælinum tann 16. juli.

Sjálvt formaðurin í føroysku samráðingarnevndini var positivt bilsin av, at bretar alment vóru farnir at brúka orðið miðlinja í sambandi við marknatrætuna, tí tað orðið hava teir ikki brúkt áður - í hvussu er ikki í hesum samráðingunum.

Síðani er tað eisini hent, at bretar einsíðugt hava gjørt av at designera part av Hvíta økinum, tí olja er funnin har nærhendis. Talan er her um øki, sum føroyingar annars ikki hava gjørt krav uppá men sum higartil hevur verið uttan fyri alment designerað bretskt øki.

Tað hevur formaðurin í føroysku samráðingarnevndini so gjørt viðmerkingar til og hevur sagt, at við einvíst at taka slíkt stig hava bretar brotið javnvágina í samráðingunum.

Emdund Joensen, løgmaður sigur við bretska útvarpið (sendingin kemur í næstum), at føroyingar eru sera ónøgdir við bretsku støðuna í marknatrætuni

Oljuídnaður ótolnast

Síðani hava vit eisini hoyrt, at oljuvinnan er vorðin ótolin og hevur lagt trýst á bretsku stjórnina at fáa gongd á samráðingarnar.

Eisini er tað komið fram, at føroyskir politikarar við løgmanni á odda eru ikki serliga fúsir til at knýta samvinnu ella hava samskifti við Bretland, soleingi bretar fasthalda síni órímuligu marknakrøv.

Umframt hetta hevur Bretland fingið nýggja stjórn, og tað kann fáa avleiðingar fyri samráðingarnar.

Aftrat hesum er so tað hent, at grønlendingar og íslendingar hava gjørt eina fyribils semju um markið millum londini. Og her verður miðlinjuprincippið brúkt tó við ávísum undantaki, har tað umstrídda økið verður býtt millum partarnar.

Síðani vit hava verið til samráðingarborðið seinast hava tí verið fleiri ymsar „meldingar", sum kunnu koma at ávirka samráðingar so ella so.

Soleiðis sum Sosialurin skilur støðuna, so hava bretar tikið aftur síni upprunaligu krøv, ið varð at fáa rættin til ein stóran part av føroyska landgrunninum.

Um somu tíð hava føroyingar alla tíðina hildið fast um miðlinjuprinsippið. Av tí at samráðingarnar eru í trúnaði ber ikki til at fáa nakað ítøkiligt at vita, men kortini hava her vit loyvt okkum at rekonstruera nakað av tí, sum er hent.

Meðan bretar sostatt hava gjørt krav uppá øki, sum liggja langt inni á føroyska landgrunninum, so hava føroyingar ikki sett nakað annað krav fram enn, um at miðlinjan, sum hevur verið brúkt sum fiskimark, eisini skal vera undirgrundarmark.

Upprunaliga vildu bretar ikki tosa um miðlinju og søgdu, at fyri tað at miðlinjan var fiskimark, so nýttist hon ikki at vera undirgrundarmark. Føroyingar harafturímóti hava gjørt galdandi, at tað er heilt ónáttúrligt, at fiskimark og undirgrundarmark ikki fylgja somu linju. Hetta er eisini tað sum altjóða havrættur leggur seg eftir í dag.

Komu við fiskimarki

Men•nú tykjast bretar so bráddliga kortini at vilja tosa út frá eini ella aðrari miðlinju - hava vit eitt nú orðini hjá Fraser í huganum. Sjálvir hava teir kravt í sambandi við uppskot teirra um ástan av fiskimarki, at óbygdir klettar vestan fyri Hetland so sum Sula skerið og St. Kilda eru grundlinjupunkt og harvið skulu avgera, hvussu miðlinjan skal teknast. Føroyingar hava bara viljað góðtikið St. Kilda sum slíkt grundlinjupunkt, tí har búðu fólk til í 30-unum og í dag er ein hernaðarstøð har.

Nú bretar hava designerað part av tí Hvíta økinum kundi hóskandi verið spurt, hví føroyingar tá ikki eisini gera tað sama. Sosialurin skilur, at føroyingar kenna seg ikki at hava nakra juridiska grundgeving fyri at designera øki, sum liggja eystan fyri miðlinjuna. Kravið hjá føroyingum røkkur nettup út til miðlinjuna og ikki longur.

Árni Olafsson, leiðari av føroysku samráðingarnevndini ynskir ikki at gera viðmerkingar til samráðingarnar annað enn tað, at hetta at bretar við síni designering hava pilkað við javnvágina í samráðingunum, gevur føroyingum høvi til at gera sær nakrar tankar um júst broyttu javnvágina. Hann vil tó einki siga, um og nær føroyingar fara at fyritaka sær nakað út frá hesum máli.

Føroyska kravið er miðlinja og skilur Sosialurin, at her er talan um eina samanhangandi argumentatión, sum juridiskt stendur væl.

Sosialurin hevur annars frætt, at løgmaður skal hava úttalað seg rættiliga hvassorðað í samrøðu við tíðindamann frá BBC, sum hevur gjørt sending um marknatrætuna. Sendingin kemur ein av fyrstu døgunum.

Samhart hesi sending skal løgmaður hava víst á sína stóru ónøgd við bretar, tí teir hava borið seg at sum spælari, ið broytir spælireglurnar, meðan hann spælir.

Í 1977 var tað størsta sjálvfylgja av verðini sæð við bretskum eygum, at fiskimarkið skuldi vera miðlinja, og tað góðtóku føroyingar. Hetta var tá eisini uppskotið hjá táverandi bretsku arbeiðarastjórnini.

Og eitt tilboð, sum ein hevur góðtikið plagar ein at meta sum eina avtalu. Men tá so partarnir møtast nøkur ár seinni, spæla bretar bráddliga við heilt øðrum reglum. Bráddliga hevur miðlinjan ongan týdning, og hetta er rættiliga langt frá tí hugtakinum, sum bretar annars sjálvir hava uppfunnið, nevniliga „fair play".

Sosialurin, sum hevur havt samband við bretska journalistin, sum gjørt hevur sendingina, hevur eisini fingið at vitað, at løgtingsmaður, sum er við í bretsku útvarssendingini, heldur tað ikki vera óhugsandi, at føroyingar fara at taka til víðgongd stig, um tað vísir seg, at bretar bara draga samráðingarnar út fyri at halda føroyingar „hen".

Vit hava spurt Árna Olafsson, um tað kann koma hartil, at føroyingar fara at designera ella geva oljufeløgum loyvi at bora í øki, sum er umstrítt!

Hann sigur, at slíkt stig mugu vit vera ógvuliga varnir við at taka, tí oljufeløgini vilja til eina og hvørja tíð vera varin, tá talan er um at gera íløgur í einum øki, har ognarrættur er óvissur.

Vit hava spurt Árna Olafsson, hvar tað umstrídda økið millum Føroyar og Bretland í veruleikanum er - og um hvussu stóran part av føroyska landgrunn-

Dánjal Nolsøe hevur verið Føroyum ein týdningarmiklil og sera gløggur ráðgevi sigur Árni Olafsson, formaður í føroysku samráðingarnevndini. Dánjal doyði fyri stuttum. Her er hann saman við Halgir W. Poulsen, sum eisini í mong ár átti ein týðandi leiklut í samráðingunum.

inum uttan fyri Hvíta økið bretar gera krav uppá.

Hann sigur, at umstidda økið er ongantíð formliga formulerað, so tað ber ikki til at svara tí spurninginum. Hann vil ikki úttala seg um, um tað umstridda økið er tað sama sum Hvíta økið ella meira enn tað.

Grønlands-Íslandsmodellið

Sosialurin skilur annars, at eitt modell, sum føroyskir myndugleikar helst høvdu viljað tosað um við bretar, er tað, sum júst er gjørt millum Grønland og Ísland, har miðlinjuprinsippið verður brúkt, men har tað so verður gjørd ein neyðsemjuloysn um tað umstridda økið, ið meira ella minni gongur báðum pørtum á møti. Her var so talan um eina gráa leið, sum var býtt í lutfallinum 1 til 3 til fyrimun fyri Grønland, sum hevur nógv størri strandalongd. Men tað kundi Ísland væl liva við.

Tað er ikki óhugsandi, at slíkt modell kann verða brúkt við Føroyar eisini. Sosialurin hevur skilt, at tað frá føroyskari síðu hevur verið lagt upp til slíkt, men at tilboðið frá føroyingum varð tikið aftur, tí hetta varð ikki politiskt hugvið.

Men nú slík semja er brúkt millum Grønland og Ísland kann hugsast, at komandi samráðingar millum føroyingar og bretar verða at snúgva seg um júst gráu sonuna, sum eitt umstrátt øki ,fyri ikki bert fiskivinnu men eisini fyri ráevni í undirgrund. Talan er um eina leið uppá einar 12.000 kvkm. Henda gráa leiðin kemur av, at føroyingar og bretar eru ikki samdir um út frá hvørjum grundlinjupunktum miðlinjan skal teknast.

Nú grønlendingar og íslendingar hava gjørt semju við nettup at býta sítt gráa øki eftir einum ávísum lykli og eisini út frá ynskinum um at halda fram við tí góða samstarvinum, kann hugsast, at bretar og føroyingar koma ásamt um at býta gráa økið, soleiðis at báðir partar samanlagt fáa og mugu lora.

Men fyri Føroyar vil hetta uttan iva vera ein góð loysn sammett við upprunaligu bretsku krøvini.

Vit hava spurt Árna Olafsson, um samráðingarnar eru komnar hartil, at tað nú bara er ein spurningur um, hvørja útgávu av miðlinju samráðst verður um!

-Tað veit eg ikki. Hetta krevur so, at mótpartur okkara viðgongur, at tað er hetta, ið samráðst verður um, men higartil hava bretar so ikki viljað -viðgingið tað.At miðlinjan so verður nevnd alment nýtist ikki at hava nakað við tað at gera.

Vit spurdu Árna Olafsson, um hann ikki hevur eitt sindur ringan smakk í munninum, nú hann so oftani hevur lagt upp til, at nú fór okkurt at henda í samráðingunum- og so einki hendi kortini!

-Eg trúði, at 1996 var árið, tá glið kom á, men so kom stígur í og nú aftur valið, so her er farin tíð fyri skeyti, sum ein einki kundi gera við".

Neyvan presedens men tó

Vit spurdu hann, um hann heldur avtalan millum Grønland og Ísland kann vera gott fyridømi fyri loysn av okkara trætu - um slík avtala ikki skapar presedens!

-Nú er tað so, at tað er ikki rætt at tosa um presedens í hesum málum, tí tey eru oftani ymisk við ymsum faktorum. Og hvat tvey lond sínamillum avtalað kunnu onnur lond ikki byggja nakran rætt á. Tí mugu vit vera varin við at tosa um presedens.

-Men heldur tú, at modellið frá Grønlandi-Íslandi hevði verið ein góð loysn fyri okkum?

-Sum sagt skal ein vera varin við at tosa um presedens. Men her er so eitt dømi um, at ein viðurkennir, at undir eini samráðing eigur hvørgin parturin at seta órímulig krøv, og tá partarnir hvør sær hava eina defineraða miðlinju frammanundan, so er tað frægasta gongda leiðin til eina loysn, at tú finnur eitt kompromi millum tær báðar ella tær ymsu miðlinjurnar.

Sosialurin skilur annars støðuna soleiðis, at tað miðlinjukonsept, sum bretar sjálvir hava skotið upp í 1977 førir nettup móti slíkari loysn, hvar tað einasta partarnir eru ósamdir um,er frá hvørjum grundlinjupunktum miðlinjan skal teknast ella hvørja linju tú teknar millum ekstremarnar hjá báðum pørtum.

Eftir tí blaðið hevur fingið upplýst frá góðum keldum og frá fólki við innliti í hesi mál, so hava bretar fingið ein sjálvskaptan trupulleika. Tí við at ganga burtur aftur frá sínum egna uppskoti um at brúka miðlinju til fiskimark, hava teir gjørt eina loysn í marknatrætuni ómøguliga.

Einasti mátin hjá bretum at sleppa burtur úr hesum trupulleika er at viðurkenna, at miðlinjan aftur verður útgangsstøðið og so mugu teir til saman við føroyingum til at býta gráu økini so ella so. Hetta er í løtuni ein kjarnin í samráðingunum.

Dánjal storan týdning fyri føroysku sakina

Sosialurin hevði herfyri prát við Dánjal Nolsøe, bert stutt áðrenn hann doyði. Sum tann sakligi og diplomatiski persónurin Dánjal var, so vildi hann ikki alment úttala seg um samráðingarnar við bretar, hóast hetta var hansara hjartamál.

Tað einasta hann vildi siga, og hetta náddu vit ikki at skriva, áðrenn hann doyði, var, at hann undraðist á, at so fáir føroyingar vístu marknatrætuni ans, tí her var talan um eitt fyri føroyingar stórt mál. Tað ræður jú bæði um fiskiríkidømi og møguligt oljuríkidømi. Nú endaliga fiskimarkið heldur ikki er sett metti hann tað eins týdningarmikið at fáa tað uppá pláss sum eitt undirgrundarmark.

Dánjal, sum hevur verið við í samráðingunum øll árini, og hevur havt ómetaliga stóran týdning fyri føroyingar í hesum eins og undanfarnum havrættarmálum, helt fyri við undirritaða, at 1997 fór at vera „The Year of Truth", sannleikans ár í sambandi við marknaósemjuna við Bretland.

Hann helt eisini, at tað nú var upp til bretar at vísa, hvat teir meintu við hugtakið „fair play".

Tá vit spurdu Dánjal, hvat hann helt um føroysku samráðingarfólkini og leiðslu okkara fyri samráðinginum helt hann fyri, at føroyingar í Árna Olafsson høvdu ein framúrgóðan samráðingarleiðara.

Nú er Dánjal farin og spurningurin er so, hvat samráðingarnevndin ger við tann spurningin. Árni Olafsson sigur, at Dánjal var ein ótrúliga gløggur ráðgevi. Hann hevði eina sera stóra vitan um alt hetta økið og ikki minst hevði hann eitt einastandandi gott minni. Soleiðis, at tú undir samráðingunum til eina og hvørja tíð kundi fáa hansara paratvitan á borðið um avtalur og lógargreinar.

Føroyska samráðingarnevndin hevur eisini brúkt danska løgfrøðingin Per Magid sum ráðgeva, og nú verður hann so partur av samráðingarnevndini. Hann er lektari á universitetinum í Keypmannahavn í altjóða rætti og hevur verið við í øllum donsku sakarmálunum við dómstólin í Haag.

Tað er nú nakað síðani, at bretar skiftu sín samráðingarleiðara út. David Andersson er farin í starv sum dómari og hevur ovasti løgfrøðiligi ráðgevin í uttanríkisráðnum Berman tikið við. Samráðingarnar í Keypmannahavn verða tær fyrstu undir hansara leiðslu.

Spurningurin er nú um uppleggið hann fer at koma við tann 16. juli, er frá tíðini, tá teir konservativu stýrdu ella um nýggja stjórnin hevur sett síni fingramerki á tað.

Undir øllum umstøðum má roknast við, at tað er lættari at gera broytingar í bretska útspælinum, nú ein nýggj stjórn hevur tikið við. Og nú tað onga leið gekst við útspælunum undir undanfarnu stjórn, kann tað bara ganga ein veg og tað er móti eini skjótari samráðingarloysn, sum byggir á miðlinjuprinsippið. Alternativið er Haag, og neyvan fer ein bretsk arbeiðarastjórn til dómstólin við føroyingum, tá hon áður hevur lagt upp til at gera miðlinju til fiskimark og annars hevur gingið inn fyri í samráðingum við onnur lond, at miðlinja eisini er undirgrundarmark.

Nú verður spennandi at siggja, hvussu leikur fer fram í Keypmannahavn - og í hvønn mun avgerðin hjá Grønlandi og Íslandi í sátt og semju at byggja eina loysn á miðlinjuprinsipp, fer at hava ávirkan á tær samráðingarnar

Próvtøkuuppgáva um úrslitið av marknasamráðingum:

Ein miðlinja sum verður flutt til fyrimun fyri Bretland



Linjan á kortinum millum Føroyar og Hetlandsrennuna sigst at vera upprunaliga bretska marknakravið

Jan Müller

Fyri nøkrum fáum árum síðani gjørdi tveir føroyingar, sum lósu løgfrøði í Danmark høvuðsuppgávu um marknatrætuna millum Føroyar og Bretland. Tær báðar, Anna Dam og S.Poulsen hava skrivað eina sera áhugaverda uppgávu, sum minni ikki sørt um eina krimi. Tær gjøgnumganga altjóða rætt á økinum og taka fram rúgvu av dømum um, hvussu aðrar sakir endaði við dómstólin í Haag.

Í niðurstøðuni koma tær til, at ein møgulig loysn á marknatrætuni vil vera tann, at miðlinjuprinsippið ferð at verða góðtikið, men at endaliga miðlinjan fer at verða korrigerað til fyrimun fyri Bretland.

Hetta kann merkja , at bretar harvið fáa ein størri part av tí gráu leiðini, sum partarnir eru ósamdir um í dag.

Vit loyva okkum at prenta niðurstøðuna av hesi uppgávu:

Konklusion

»Efter den sidste forhandlingsrunde mellem parterne, der afholdtes i maj d. å., kan det formodes, at forhandlingsdelegationerne afventer politiske signaler fra de respektive regeringer, der tilkendegiver hvilken retning, den videre udvikling af sagen skal tage, idet parterne synes at stå langt fra hinanden, hvis der ellers kan lægges nogen vægt på de – ikke dementerede – oplysninger i pressen.

Situationen i dag er, at begge parter ønsker en forhandlingsløsning, og det er vores indtryk, at det er UK, der presser mest på, for at en sådan løsning skal nås. En iagttagelse, der bestyrker denne opfattelse, er det faktum, at den britiske forhandlingsdelegation nu er blevet udvidet med repræsentanter fra den britiske olieadministration.

På trods af den økonomiske krise, som Færøerne befinder sig i, synes det, som om den dansk/færøske forhandlingsdelegation ikke er underlagt et tilsvarende pres som den britiske, der under forhandlingerne må have i baghovedet, at UK har en kæmpe olieindustri, der skal »holdes gående«.

Færøerne derimod, har i oktober 1993 udbudt undergrunden til seismiske undersøgelser, der skal løbe over en toårig periode, og har derfor ikke samme akutte hastverk. [142]

Vores indtryk er, at parterne vil gå meget langt for at undgå, at konflikten ender hos Domstolen, deres erfaringer i tidligere sager taget i betragtning. Her tænkes, for Danmarks vedkommende på Jan Mayen sagen fra 1993, som man vel ikke kan sige at Danmark tabte, men man fik utvivlsomt mindre end forventet. For UK's vedkommende ved man, at afgrænsningskonflikten med Irland blev henlagt til en voldgiftsret, men at parterne alligevel til sidst, gennem forhandlinger, nåede til enighed. UK's »traumatiske« oplevelse i den ango/franske sokkelsag i Kanalen har utvivlsomt medvirket hertil.

Vores konklusion må derfor være, at parterne ved afgrænsningen af det nordlige område som udgangspunkt må anlægge en midtlinje, og selvom kystlængdeforskellen ikke er af betragtelig størrelse, må en vurdering af samtlige relevante og særlige omstændigheder herunder proportionalitetsbetragtninger tale for, at en midtlinje korrigeres til fordel for UK.

Det skal understreges, at vi antager midtlinjen for at være udgangspunktet, og at den korrektion, der givetvis vil blive foretaget i en domstolssituation, ikke vil komme til at følge den britiske kravlinje.

Med hensyn til afgrænsningen af det sydlige område – på plateauet – er det vanskeligere at konkludere. Havretten står, med den forestående ikrafttrædelse af 1982-konventionen til november i år, foran en udvikling, der er svær at forudsige.

Vores vurdering af den dansk/færøske designering på plateauet er, at den umiddelbart kan se ud til at være noget overdreven, men vi når imidlertid til, at Færøerne står med de stærkeste geologiske argumenter. Under alle omstændigheder må det dog konkluderes, at denne designering ikke giver et billede af, hvordan den endelige afgrænsnings linje på plateauet kommer til at se ud.

På kortere sigt må begge parter antages at lægge større vægt på at nå til enighed om det nordlige område, hvor det økonomiske pres for at komme igang med udnyttelse af eventuelle olieforekomster er størst.

På den anden side må potentialet på Plateauet på længere sigt tillægges en så betydelig vægt, at det forekommer usandsynligt med en aftale, der ikke også omfatter det sydlige område.

For Færøernes vedkommende spiller fiskeriet også en så væsentlig rolle, at en sokkelgrænse isoleret næppe kan være tilfredsstillende.

Situationen er således

Framhald á síðu 18

Framhald av síðu 13

meget kompleks, hvilket kan gøre en forhandlingsløsning vanskelig, men på den anden side også virke så tilpas afskrækkende for parterne at gå til Domstolen med, at vor forventning er, at man, på trods af vanskelighederne ved at forene de modstridende interesser, alligevel vil være i stand til at bøje så meget af mod hinanden, at resultatet bliver en aftale«

* *se bilag nr. 28. Lagtingslov nr. 179 af 21 okt 1993 om forundersøgelser m.m af Færøernes undergrund.*

Konsert í Vágs kirkju

Danska sopransangarinnan Kirsten Johansen hevur konsert í Vágs kirkju í kvøld kl 20

Við á ferðini eru danski organisturin Søren Johannesen og føroyski bratschspælarin Anfinn Joensen. Hann spælir á eina bratsch, sum Mogens Egholm hevur bygt

A skránni er verk eftir J. S Bach, G F Händel, H. Purcell, E. Grieg umframt føroysk og donsk verk.

Konsertir verða eisini í Funnings kirkju og í Vesturkirkjuni Konsertfelagið skipar fyri.

Anfinn á fløgu

Í dag kemur út nýggj fløga hjá Anfinn & Co.

Tað eru gamlir slagarar, ið eru endurviðgjørdir, soleiðis at góðskan er nógv betri Sangirnir hava áður bara verið á kasettubandi .

„Sera gott úrval" er heitið á fløguni, og Anfinn ætlar innan 1. september at geva úr „Sera gott úrval nr. 2". Á tí fløguni er ætlanin at hava løg hjá fleiri føroyskum bólkum

F. C. Búðin í Havn stendur fyri øllum útgávum hjá Creativ Music.

Fyrstalærarastarv í Eiðis Skúla

Starvið sum fyrstilærari í Eiðis Skúla verður hervið lýst leyst til setanar frá 1. august 1997.

Í skúlanum eru nú 78 næmingar í 7 árgangum. 5 lærarar starvast í skúlanum.

Søkt verður eftir fyrstalærara, sum

- undir ábyrgd skúlamyndugleikanna skal hava fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna av virksemi skúlans
- skal sýna leiðslumyndugleika og -hegni
- er góður at samstarva við og fyrikomandi
- er kveikjandi í sínum skúlahugsanum
- á fólkaræðisligum støði skal fremja góðar arbeiðsumstøður og gott samstarv millum næmingar, lærarar og onnur starvsfólk
- er førur fyri at skilja støðuna hjá øðrum fólkum.

Harumframt skal fyrstilærarin

- hava hug og hegni til at átaka sær fyrisitingarliga ábyrgd
- leggja dent á at fremja andsfrælsi, tolsemi og gott samarbeiði millum heim og skúla
- vera førur fyri at loysa møguligar trupulleikar
- vera førur fyri at menna starvsfólkaleiðsluna
- skapa virðing fyri skúlanum og umstøður hjá tí einstaka fyri medávirkan og medábyrgd
- leggja dent á menning av skúlaskapinum í kommununi
- eggja næmingum, foreldrum og lærarum til at leggja doyin á at fáa sum mest burtur úr skúlagongdini bæði fakliga og sosialt.

Umsøkjari skal hava fólkaskúlalæraraútbúgving og drúgvar starvsroyndir í fólkaskúlanum.

Setanarøkið er undir Føroya Landsstýri, og tænastustaðið er fyribils í Eiðis Skúla

Starvið verður lønt í 19., 24. og 28. lønarflokki sambært semju millum Føroya Landsstýri og Føroya Lærarafelag, dagfest 24. januar 1990.

Tað skylduga undirvísingartímatalið verður ásett eftir galdandi reglum um tænastutíðina hjá tænastumonnum í fólkaskúlanum.

Umsókn, sum verður skrivað á oyðublað, ið fæst frá Landsskúlafyrisitingini, skal verða send ***Landsskúlafyrisitingini, Falkavegi 6, postrúm 3279, 110 Tórshavn***, skjótast til ber og soleiðis, at hon er Landsskúlafyrisitingini í hendi í **seinasta lagi 4. august 1997.** Við umsóknini eiga at verða løgd ljóstøk av próvbrævi og møguligum viðmælum.

Tórshavn, 15. juli 1997

LANDSSKÚLAFYRISITINGIN

KAPPSIGLING

verður

sunnudagin 20. juli, kl. 14.

Siglt verður á Hvitanes. Fráboðan um luttøku á tlf. 14080 ella 12778.

SEGLIÐ

KONSERTIR

Vágs kirkja mikud. 16. juli kl. 20
Funnings kirkja hósd. 17. juli kl. 20
Vesturkirkjan fríggjad. 18. juli kl. 20

Kirsten Johansen – sopran
Søren Johannsen – klaver
Anfinn Joensen – bratsch

SKRÁ:

J. S Bach.	Preludium í Ess-dur
J. S. Bach/Gounod.	Ave Maria
G. F. Handel:	Luscia Chio Pianga Ch'io Mai Vi Possa
H. Purcell	Didos Aria
J. S Bach.	Fuga í D-moll
Grieg:	Jeg rejste en dejlig sommerkveld Med en primula veris Vaaren
Trad.	Føroyskir sálmar
J. P. Hartmann.	Fantasi í F-moll
C. Nielsen:	Underlige aftenlufte
C. E. F. Weyse	Natten er så stille
T. Laub:	Stille, hjerte, sol går ned

Konsertfelagið

Skráseting Føroya
hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan

Skrásetingar-nr.
P/F 1708. **P/F Neta. 620 Runavík.**

Nevnd:
Farin úr nevndini: Karla Einarsson, 600 Saltangará (formaður), Hilmar Peter Nielsen, 600 Saltangará, Johannes Davidsen, 620 Runavík, Hans Peter Leo Samson Hansen, 620 Runavík.

Stjórn:
Farin frá sum stjóri: Hilmar Peter Nielsen, 600 Saltangará.

Felagið er farið í likvidatión við Jónfinn Thomsen, advokati, Áarvegur 1, 100 Tórshavn sum likvidator.

Skráseting Føroya
tann 8. juli 1997

Kristin Balle

Skráseting Føroya
hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan

Skrásetingar-nr. P/F 283,
P/F Byggifelagið G. Waagstein. á Hjalla 15, 100 Tórshavn

Viðtøkur broyttar:
27.05.1997

Nýtt navn:
P/F Alma Maskinverkstaður & Smiðja

Hjánavn: P/F Byggifelagið W. Waagstein (P/F Alma Maskinverkstaður & Smiðja)

Felagið er samanlagt við skrásetingar-nr. P/F 2121, P/F Alma Maskinverkstaður & Smiðja, sum samstundis verður strikað.

Skráseting Føroya
tann 8. juli 1997

Kristin Balle

Skráseting Føroya
hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan

Skrásetingar-nr. P/F 792,
P/F Jóannes Thomsen, 530 Fuglafjørður.

Stjórn:
Farin frá sum stjóri:
Napoleon Thomsen,
530 Fuglafjørður.
Innkomin sum stjóri:
Jóhan Ólavur Thomsen,
530 Fuglafjørður.

Skráseting Føroya
tann 10. juli 1997

Kristin Balle

Tiltøk

Frelsunarherurin, Tórshavn
Í dag kl. 16: Bøn.

Samkoman Sion, Vágur
Sunnudag: Morgunmøti kl. 11.00. Evangeliskt møti kl. 18.00

Telefonandaktin svarar á 73777.

Al Anon, Tórshavn
Fundir fyri avvarðandi av alkoholikarum eru hvørt týskvøld og hvørt hóskvøld kl. 21 í Tórsgøtu 5 (inngongd vestanfyri).

AA-fundur í Havn
Sporafundur verður í kvøld kl. 20 í Tórsgøtu 5 (inngongd vestanfyri).

Amnesty International Føroya deild
Skrivstovan er opin:
Týsdag kl. 8.30–12.30
Hósdag kl 8.30–16.30

Felagið Føroyar-Kuba
Í summar er einans opið fast hvønn mikudag kl. 16–18 í felagshølinum í Kongagøtu 11, Tórshavn. Tó ber til at ringja 13016 og faxa á 13824

Eliaskirkjan
Møti er hvørt leygarkvøld kl. 19 í kjallaranum í Eliaskirkjuni á Vesterbro Torv, Vesterbrogade 49, bert 2 min. frá Føroyahúsinum (tó ikki 26. juli). Bussarnir 1, 6, 14, 16, 28 steðga nærhendis. Øll kunnu vera við Fleiri upplýsingar við at venda sær til Atla Rasmussen, tlf. 32886727, ella John Petersen, tlf. 36789046

Kristnastova
Birmavej 36, København S, tlf. 31 55 18 09 / fax 31 58 61 49

Fríggjakvøldið kl. 20 er kristiligur fundur.

Sunnumorgunin kl. 11 er samkomufundur við breyðbróting og sunnudagsskúli kl. 12.30.

Evangeliska Røddin
Odense. Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

Malta, Hirtshals
Sunnudag
Kl. 11: Breyðbróting
Sunnudagsskúlin byrjar aftur, tá skúlarnir byrja
Kl. 18: Evangeliskur fund-

Deyvafelag Føroya

Skrivstovan í Deyvahúsinum »Effata«, Íslandsvegur 10 B, er opin mánadag–fríggjadag kl. 9–15. Telefon 17597. Telefax 13609. Teksttelefon, ring 0032 og bið um 16929. Limafundur hvørt mánakvøld kl. 19–23.

Spastikarafelagið

Felag fyri spastikarar og børn/vaksin við líknandi breki, t.d. vøddasvinn. Felagið heldur til í MBF-húsinum, Íslandsvegi 10 C. Skrivstovutíð hvønn hósdag kl. 14–16. Tlf. 19027, Fax 10613 (MBF).